## Lodnukvotan veksur

Íslendska fiskimálaráðið gjørdi í gjár av at loyva lodnuskipunum at veiða 50.000 tons afturat teimum 100.000 tonsunum, sum skipini fingu loyvi til í síðstu viku. Fiskimálaráðið sigur, at avgerðin er tikin eftir tilmæli frá fiskifrøðingunum, eftir at havrannsóknarskipið „Árni Friðriksson" hevði funnið eina torvu afturat har eysturi á Suðurlandinum. Skipið er nú givið at leita sunnanfyri og fer at leita nú at leita á Vesturlandinum.



## Stórkavi í Oyggjunum

Tað var av ringasta veðri í Vestmannaoyggjunum um vikuskiftið við stormi av landssynningi við 30 metrum um sekundið og kavaroki. Fleiri, sum hava búð í Oyggjunum í mong ár, søgdu seg ikki hava upplivað so ringt veður fyrr, og sambært bløðunum er hetta mesti kavi, sum hevur verið síðani 1968. Allir vegirnir á Heimaey vóru stongdir av kava, og tað tók monnum hjá kommununi nógvar tímar at grava høvuðsvegirnar.

Shipping-ráðstevna:

# Einfalt at vera í FAS - men ikki haldbart



*- FAS-skipanin er ikki kappingarfør. Hon er ikki tillagað, og tí er tað ógvuliga trupult hjá skipum undir FAS at kappast við skip, sum sigla undir eitt nú DIS og NIS, sigur Álvur Højgaard, stjóri í Frakt og Sandsøluni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Frakt og Sandsølan í Runavík hevur seinastu árini vaksið um sítt virksemið, og í dag hevur felagið 50 sjófólk umborð á seks skipum, harav tey fimm sigla uttanfyri landoddarnar**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir vóru fýra, sum í 1966 løgdu lunnar undir fyritøkuna, sum í dag kallast Frakt og Sandsølan í Runavík. Felagið byrjaði við sandbáti og sandsølu, og hetta er framvegis ein partur av virkseminum hjá ættarliðnum, sum í dag situr við stýrisvølin í fyritøkuni.

Í dag telir tann parturin, sum fevir um upptøku, flutning og sølu av sandi í Føroyum bert 5% av samlaða umsetninginum, meðan sigling og flutningur uttanlands telir hini 95%.

Jacob Højgaard, sáli og sonur hansara, Niclas, vóru millum stovnararnar, og nú eru tað fýra synir hjá Niclasi við Álvi Højgaard sum stjóra, ið reka fyritøkuna.

Her heima í Føroyum hevur felagið sandbátin Burgundiu, og í sigling uttanlands hevur felagið fimm størri og smærri skip.

### Flotin veksur

- Nýggjastu skipini hjá okkum eru Hav Sund, sum vit í januar keyptu frá P/F Run í Runavík og Hav Tind, sum vit keyptu av Isle of Wight tíðliga í fjør heyst.

Álvur Højgaard sigur, at trý av skipunum, sum felagið eigur, eru í fastari sigling í Noregi, meðan tvey eru í fríari sigling.

- Einir 50 mans eru knýttir at okkara skipum, harav teir 46 sigla uttanlands. Hinir sigla við Burgundiu. Á skrivstovuni í Runavík eru vit trý.

Hann sigur, at fýra póllendingar sigla fyri Frakt og Sandsøluna, men annars er øll manningin føroysk, og øll skipini uttan Burgundia sigla undir FAS-skipanini.

Manningarnar eru seks vikur umborð og seks vikur í landi.

### Eingin tillaging

Álvur Højgaard vísir á, at tað er einfalt at sigla undir føroysku altjóða skipaskrásetingini, men hetta er ikki haldbart í longdini, sum hann tekur til, tí skipanin er ikki nóg góð fyri okkara sjófólk.

- FAS-skipanin er ikki kappingarfør við eitt nú donsku og norsku skipanirnar. Hon er ikki tillagað, og tí er tað ógvuliga trupult hjá skipum undir FAS at kappast við skip, sigla undir eitt nú DIS og NIS.

Álvur heldur kortini, at framtíðin teknar seg rímiliga væl hjá Frakt og Sandsøluni, og seinastu árini hevur bara gingið framá hjá felagnum.

- Men neyðugt verður heilt avgjørt at tillaga føroysku altjóða skipaskrásetingina, so hon gerst meira attraktiv og kappingarfør við aðrar skipanir um okkara leiðir, sigur stjórin í Frakt og Sandsøluni.



*Hav Frakt er eitt av fimm skipum, sum siglir millum útlendskar havnir. Síðan í fjør heyst er flotin hjá Frakt og Sandsøluni øktur við tveimum skipum, Hav Sundi og Hav Tindi*